## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri, leygardagin hækkar hann upp í landnyrðing. Stundum regn og hitin millum 8 og 12 stig.



*Mynd: D. Olsen*

# Dupult

Ólavsøkugestirnir eru mangir, smærri og størri. Ólavsøkan í ár var vættlig. Í hvussu er, um ein hyggur eftir veðrinum ólavsøkudag.

Hesar báðar fittu genturnar skoðaðu kappróðurin í góðveðrinum ólavsøkuaftan.

Hjá so lítlum er nógv at síggja á ólavsøku. Tær báðar Elisa og Leila vóru í føroyskum búna og fingu óivað eisini mong at hyggja meira enn einaferð, so fittar tær vóru. Tvíburðarnir Elisa og Leila eru tó næstan á heimavølli, tí hóast tær koma úr Vági, haðani pápin er, so er mamman úr Havn.

Men kanska onkur hendinga ólavsøkugestur hugdu meira enn ta einu ferðina. Tí lætt er at fara skeivur á ólavsøku og er ov nógv innanborða, so er tíð at slaka við tí váta slagnum. Og víst tekin um, at ov nógv er komið innum, er tá heimurin tykist tvífaldur. Sær ein dupult, so er stundin komin at halda aftur, sigst.

Er lagið gott og ein sær tvær fittar gentur, ið líkjast, í føroyskum búna og roðskóm og í einum og sama vogni, so er ikki lætt at vita, hvørt tað eru eyguni, ið bila, ella um talan í veruleikanum er um veruleika og tvíburðar.

Í hesum førinum var talan um veruleika og fittar tvíburðar. Og tað kann so vera troyst, um onkur ólavsøkukappi enn gongur og ivast.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 13 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 14 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 29 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | – |
| Paris | 27 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 35 |
| Athen | 35 |
| Malta | 34 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 984 hPa. í landnyrðing úr Føroyum hvørvur í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1016 hPa. á 53N-28V, fer eisini í landnyrðing.




Ein lítil hátrýstryggur yvir Íslandi verður yvir Føroyum mikudagin. Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer eystureftir suður um Føroyar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/07 kl. 06⁰⁰– 30/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 29/07 kl. 06⁰⁰– 30/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 76,2 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

4. august: Full sól
5. august: Mánin longst frá jørðini
12. august: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. juli | 04.36 | 17.02 | 03.36 | 16.02 | 03.51 | 16.17 | 06.36 | 19.02 | 07.36 | 20.02 | 02.51 | 15.17 | 01.51 | 14.17 | 04.51 | 17.17 | 05.51 | 18.17 | 04.21 | 16.47 | 05.36 | 18.02 |
| 1. aug. | 05.25 | 17.49 | 04.25 | 16.49 | 04.40 | 17.04 | 07.25 | 19.49 | 08.25 | 20.49 | 03.40 | 16.04 | 02.40 | 15.04 | 05.40 | 18.04 | 06.40 | 19.04 | 05.10 | 17.34 | 06.25 | 18.49 |
| 2. aug. | 06.14 | 18.38 | 05.14 | 17.38 | 05.29 | 17.53 | 08.14 | 20.38 | 09.14 | 21.38 | 04.29 | 16.53 | 03.29 | 15.53 | 06.29 | 18.53 | 07.29 | 19.53 | 05.59 | 18.23 | 07.14 | 19.38 |
| 3. aug. | 07.02 | 19.25 | 06.02 | 18.25 | 06.17 | 18.40 | 09.02 | 21.25 | 10.02 | 22.25 | 05.17 | 17.40 | 04.17 | 16.40 | 07.17 | 19.40 | 08.17 | 20.40 | 06.47 | 19.10 | 08.02 | 20.25 |

Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

BILLUTIR
ÚT GA T
TIL L T
ALLAR BILAR
A BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes

Uppsetan av antennum og parabolum
Ring og hoyr nærri ella støkk inn á gólvið



Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radioep@olivant.fo
RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16 · FO- 100 Tórshavn
Tlf. 318277 · Fax 318377